# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Ve›ri› í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og eitt skifti regn, annars mjørki í støðum. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind.Sirm ella mjørki av og á og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 8 og 11 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 7 og 11 stig.



*Hesi trý tjøldrini síggja køld út, men hetta reingir kortini ikki við tann veruleika, at 12. mars - grækarismessa - er í næstu viku. Og várið er í hondum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tjøldrini eru komin

Nú er bert góð vika eftir til grækarismessu, tá tjøldrini koma.

Hesin tjóðarfuglur okkara hugsar helst ikki um dagfesting og hátíðarhald, men í instinkti sínum liggur tráðanin eftir at koma aftur til oyggjar okkara á hvørjum ár.

Fleiri staðir kring landið hava fólk hoyrt eyðkenda látið frá tjaldrinum, og onkur hava helst eisini borið eyga við henda vakra fuglin.

Staddur á Oyri um middagsleitið í gjár, kom myndamaður okkara fram á ein heilan flokk av tjøldrum, sum leitaðu eftir føði í nánd av Skeljavirkinum.

Hóast kuldan í luftini, kávaði hetta ikki út yvir tann veruleika, at nú er várið brádliga í hondum.

Verð vælkomið enn eina ferð til land okkara!

*sb.*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | -6 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -1 |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -- |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | -6 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 17 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 13 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1006 hPa. við Scoresbysund fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landsynning.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Angmagssalik fer í landnyrðing og hitabrúgvin við Føroyar fer eystureftir. Hátrýstið vestan fyri Bretsku Oyggjarnar stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/03 kl. 06[00] – 4/03 06[00]. Hitin í gjár: 3,5°
Minsti hiti máldur í mars: 3,8° -
Mesti hiti máldur í mars: 4,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 3/03 kl. 06[00] – 4/03 06[00].
Avfallið higartil í mars: 1,4 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

27. februar – Mánin næstur jørðini
28. februar – Fullmáni
7. mars – Seinna kvarter
12. mars – Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mars | 9:21 | 21:46 | 8:21 | 20:46 | 8:36 | 21:01 | 11:21 | 23:46 | - | 12:21 | 7:36 | 20:01 | 6:36 | 19:01 | 9:36 | 22:01 | 10:36 | 23:01 | 9:06 | 21:31 | 10:21 | 22:46 |
| 5. mars | 10:12 | 22:38 | 9:12 | 21:38 | 9:27 | 21:53 | - | 12:12 | 0:46 | 13:12 | 8:27 | 20:53 | 7:27 | 19:53 | 10:27 | 22:53 | 11:27 | 23:53 | 9:57 | 22:23 | 11:12 | 23:38 |
| 6. mars | 11:04 | 23:29 | 10:04 | 22:29 | 10:19 | 22:44 | 0:38 | 13:04 | 1:38 | 14:04 | 9:19 | 21:44 | 8:19 | 20:44 | 11:19 | 23:44 | - | 12:19 | 10:49 | 23:14 | - | 12:04 |
| 7. mars | - | 12:24 | 11:24 | - | 11:39 | - | 1:29 | 14:24 | 2:29 | 15:24 | 10:39 | 23:18 | 9:39 | 22:18 | - | 12:39 | 0:44 | 13:39 | - | 12:09 | 0:29 | 13:24 |
| 8. mars | 1:03 | 13:43 | 0:03 | 12:43 | 0:18 | 12:58 | 3:03 | 15:43 | 4:03 | 16:43 | 11:58 | - | 10:58 | 23:22 | 1:18 | 13:58 | 2:18 | 14:58 | 0:48 | 13:28 | 2:03 | 14:43 |